VINNUSÍÐURNAR

# Sveiggj ella rák

SJÓNARMIÐIÐ
*Signar P. Heinesen*






Týðandi trupulleikar í alivinnuni, týðandi trupulleikar í rækjuvinnuni, týðandi trupulleikar í fiskivinnuni, at kalla eingi nýggj virkisøki tey seinastu 15 árini og fleiri mist virkisøki annars. Og útlendingar keypa føroysk virkir. Hvør er lýsingin av hesi støðuni?

Tað orðið, sum vit oftast hoyra, er føroyska orðið sveiggj, sum á fremmandum máli verður nevnt konjunkturar. Er hetta mest viðkomandi hugtakið til støðuna?

### Sveiggj

Høvuðseyðkennið við sveiggi er, at í miðal yvir tíð er eingin broyting. Hóast hitin í juli mánaða í Tórshavn er ymiskur, rokna vit vanliga við, at í miðal yvir fleiri ár, er hitin á leið tann sami. Veruligi hitin kann samansetast av einum miðalhita og eini óvissu. Myndin, sum vit kenna frá Skriftini, eru tey sjey góðu árini og tey sjey vánaligu árini. Aldan - alduryggur og aldudalur - er annað væl kent hugtak.

Tá ið ábyrgdarfólk siga, at vinnuliga støðan í landinum er í einum sveiggi, siga hesir persónar meir enn vit ofta geva okkum far um.

Í einum sveiggi rokna vit vanliga við, at vinnan skal halda stand. Ikki so, at vinnan ikki skal tillaga seg, men í høvuðsheitum skal hon halda kós og um neyðugt nýta av uppsparda virðinum eins og Jósef á sinni, til tey góðu árini venda aftur.

Sum skilst á almennu upplýsingunum hevur alivinnan tey seinastu tvey-trý árini brúkt um 500 milliónir kr. í eginogn og bankarnir umleið somu upphædd eftir hesum leisti. Higartil hevur eingin givið sær stórvegis far um at spyrja hví og hvør hevur ábyrgdina av hesum, hóast Búskaparráðið fyrr í ár legði upp til eina slíka eftirmeting og Sjónvarp Føroya royndi at nærkast spurninginum eina løtu. Hvussu nógv rækjuvinnan hevur nýtt havi eg ikki hoyrt. Okkurt bendir á, at reiðarar hava tikið avgerðir, sum

